**Frágreiðing frá arbeiðsbólki, sum varð settur at gera uppskot til einfalda skipan fyri, hvussu ein marknaður kann skipast í søluliðinum. Arbeiðssetningurin er ásettur í pkt. 7 í sonevnda semjuskjalinum millum Føroya Landsstýri og Kommunufelagið, sum varð undirritað 22. mars 2022.**

***Arbeiðssetningur:***
*At orkumyndugleikin og samráðingarnevndin fyri Kommunufelagið/SEV seta bólk við tveimum umboðum fyri hvønn partin at kanna, hvussu ein marknaður í søluliðinum verður skipaður á ein einfaldan og ódýran hátt. Endamálið er at skapa dynamisk tilboð til brúkaran, t.d. til upphiting av húsum, løðing av bilum, elektrifisering av ídnaði, framleiðslu av grønum brennievni og øðrum brúki av vitbornari eltøkni, sum eggjar brúkaranum at leggja um til varandi orkukeldur.*

*Kanningin, sum eigur at verða liðug í 2023, kann m.a. taka støði í frágreiðingini Reform av kraftsystemet på Færøyene (AFRY) og frágreiðingini Fastsættelse af systemomkostninger i SEV (Deloitte), men nýtist ikki vera avmarkað til niðurstøður úr hesum frágreiðingum.*
*Um arbeiðsbólkurin ikki kann semjast um eitt tilmæli ella um ávísar partar av uppgávuni, kunnu landsstýrismaðurin í umhvørvis- og vinnumálum og samráðingarnevndin fyri Kommunufelagið/SEV gera av, hvussu víðari verður farið fram fyri at finna semjur, t.d. við í felag at tilnevna fakligan semingsmann ella serliga nevnd við fakligum førleikum at flyta málið fram á leið.*

**Luttakarar í bólkinum:**
Hilmar Høgenni, formaður, Sigurð í Jákupsstovu og Ari Johanneson vegna Føroya Landsstýri

Tórbjørn Jacobsen, Hans Kári Vang og Bogi Bech Jensen vegna Føroya Kommunufelag

**Innleiðsla**
Samanumtikið skal kannast, hvussu ein marknaður kann skipast í søluliðinum á ein einfaldan og ódýran hátt við tí endamáli at skapa brúkaranum dynamisk tilboð, m.a. til:

- upphiting av húsum
- løðing av bilum
- elektrifisering av ídnaði
- framleiðslu av grønum brennievni
- annað brúk av vitbornari eltøkni, sum eggjar brúkaranum at leggja um til varandi orkukeldur

Upphiting av húsum og løðing av bilum venda sær til ein breiðan brúkaraskara (19.000 húsarhald og uml. 39.000 bilar eru í Føroyum).

Elektrifisering av ídnaði og framleiðsla av grønum brennievni venda sær til ein í tali lítlan brúkaraskara, sum tó er ein stórur bólkur í orkunýtslu.

Dynamisku tilboðini á elorkumarknaðinum eiga í størst møguligan mun at elva til økta gagnnýtslu av varandi orku og harvið til økta virðisskapan í elskipanini. Tilboðini kunnu leggja upp fyri, at talan er um ymiskar kundabólkar.

Væntanin/ætlanin er, at sølufeløgini veita brúkarum orkuveitingar og -tænastur, sum samanlagt skunda undir elektrifisering av húsarhaldum og øðrum brúkarum. Veiting av framkomnum orkuloysnum til býli og bygningar, har ein vaksandi partur av orkunýtsluni kemur frá varandi orkukeldum, er týdningarmikil. Hjá brúkarum kann tað vera møtimikið at velja røttu loysnirnar, men við einum vælvirkandi sølu- og tænastuliði ber til at menna ymiskar loysnir, sum gagna brúkaranum og orkuskiftinum.

**Gongdin**

Arbeiðsbólkurin hevur havt sjey fundir. Fyrstu tveir fundirnir fóru til at viðgera evnið og umrøða, hvørji tilmæli bólkurin kundi finna semju um. Á triðja fundinum vóru ávikavist Magn, Effo og SEV inni og greiddu frá sínum sjónarmiðum um, hvussu sølan av elorku kann skipast, soleiðis at brúkarin fær fjølbroyttari møguleikar at leggja um til grøna orkuveiting.

Á fimta fundinum luttóku umboð fyri Vinnuhúsið og greiddu frá sínum sjónarmiðum.

**Elnetið**

Elnetið hjá SEV fevnir um netið frá framleiðslu til og við málaranum hjá endabrúkaranum, t.e. flutningsnetið og býtisnetið. Harumframt eru dieselverk, vatnverk og møgulig pumpuverk eisini flokkað undir netpartin hjá SEV, tí hesi veita skipanarberandi tænastur.

SEV hevur balansuábyrgd og er systemoperatørur í elskipanini.

**Søluliðið og prísmodell**

Bólkurin er samanumtikið komin til hesar niðurstøður við atliti at, hvussu ein elmarknaður kann skipast á ein einfaldan og ódýran hátt.

SEV keypir alla møguliga framleidda elorku og selur søluliðinum hana (smásøla ella heilsøla) við skiftandi tímaprísi, sum endurspeglar sveiggjandi framleiðsluútreiðslurnar gjøgnum samdøgrið í mun til tað til eina og hvørja tíð væntaða orkumiksið. Tá nógv vindorka er, lækkar elprísurin, og tá nógv olja verður brúkt í framleiðsluni, hækkar elprísurin.

SEV kunnger dagliga ein bindandi tímaprís fyri hvønn tíma teir næstu 24 tímarnar. Miðað eigur at verða ímóti rullandi 24 tímum, soleiðis at tað til eina og hvørja tíð er greitt, hvat prísurin verður komandi 24 tímarnar. Eisini skal SEV kunngera eina metta prísforsøgn fyri komandi dagarnar, sum er so neyv sum gjørligt.

Skiftandi tímaprísurin umboðar skiftandi útreiðslurnar í elframleiðsluni umframt yvirskot til neyðugar íløgur. Tímaprísurin byggir á veðurforsagnir komandi 24 tímarnar rullandi. Veruligu útreiðslurnar eru ikki kendar, fyrr enn samdøgrið er farið. Munurin á mettum og veruligum útreiðslum verður tí íroknaður tímaprísirnar fyri komandi samdøgrið.

Strembast skal eftir, at netgjaldið eisini kann vera skiftandi í mun til skiftandi trýst á elnetið. Á henda hátt, tá nógv vindorka er tøk og trýstið lágt, verður møguligt at lækka prísin meira.

Bert góðkendar fyritøkur kunnu luttaka í søluliðinum. Umhvørvisstovan og SEV menna saman krøvini til sølufyritøkurnar. Út frá hesum krøvum góðkennir Umhvørvisstovan sølufyritøkurnar.

SEV luttekur í søluliðinum, soleiðis at endabrúkarin altíð kann keypa elorku beinleiðis frá SEV. SEV skal gera sjálvstøðugan roknskap, sum vísir beinleiðis útreiðslurnar av at luttaka í søluliðinum. Útreiðslurnar fevna um bókhald og kundasamband og eiga tí at vera so lágar sum gjørligt. Fyri ikki at áleggja brúkaranum óneyðugar útreiðslur er ikki neyðugt at skipa hetta virksemið í sjálvstøðugt felag, so leingi søluliðið hjá SEV leiðir streymin beinleiðis víðari til endabrúkaran. Prísurin hjá endabrúkaranum er tí kunngjørdur heilsøluprísur frá SEV umframt veruliga kostnaðin av at umsita endabrúkaran.

Vil SEV luttaka í søluliðinum á jøvnum føti við aðrar sølufyritøkur og menna tænastur í søluliðinum, skal hetta gerast í sjálvstøðugum partafelag, sum er skipað soleiðis, at krossstuðul og persónsamanfall ikki eru møgulig.

SEV kann gera avtalu um lægri prís til størri kundar, sum eitt nú eru íbundnir háspenning ella kunnu veita skipanarberandi tænastur. Lægri prísurin skal umboða sparingar hjá SEV av at hava stóru kundarnar og skal góðkennast av Elveitingareftirlitinum

Tórshavn, tann 1. desember 2023

**Vegna Føroya Landsstýri:**

| | | |
|---|---|---|
| Hilmar Høgenni, formaður | Sigurð í Jákupsstovu | Ari Johanneson |

**Vegna Kommunufelagið:**

| | | |
|---|---|---|
| Tórbjørn Jacobsen | Hans Kári Vang | Bogi Bech Jensen |

**Hjálagt skjal:**

- Uppskot um bygnað á elorkuøkinum

**Uppskot – bygnaður á elorkuøkinum:**

